# Hósmorgun klokkan hálvgum ellivu

“*Góðan morgun*”, sigi eg við tí væl vanda smílinum, tá lítla klokkan yvir hurðini ringir. Klárt og týðiligt, so kundarnir hoyra, men samstundis blítt og vælkomandi. Kvinnan lyftir høvdið; eitt sindur kløkk, men svarar við einum smíli.
Hon andar djúpt og rættir ryggin, stendur still eitt lítið bil, og gongur so inn í handilin. Hon fer framvið diskinum, hyggur ikki at mær. Tað virkar ikki heilt, sum at hon sær meg, hóast hon júst hugdi meg í eyguni.

Eg havi arbeitt her í næstan tvey ár nú. Eg skuldi bara hava eitt arbeiði í summarfrítíðini, áðrenn eg fekk mær tað *veruliga* arbeiði; ella fekk mær eina útbúgving, sum mamma og babba vilja. Eg skuldi bara samla mær eitt sindur av peningi. Eg ætlaði mær eisini at ferðast og uppliva verðina. Eg ætlaði mær at lesa allar tær ikki-skúlabøkurnar, sum standa á hillunum í kamarinum. Og mála. Og eg skuldi endiliga binda troyggjuna lidna, sum mamma kastaði uppá til mín. Mangli bara hálva ermu.
Men eg tími ikki.
Eftir fimm mánaðir spurdi eg endiliga stjóran um at arbeiða fast. Mamma og babba eru ikki so nøgd. Men eg elski tað. Og skjótt bleiv eg varaleiðari.
Hvønn morgun klokkan níggju lati eg handilin upp. Burtur sæð frá sunnudegnum sjálvandi. Eg støvsúgvi og ruddi líka upp. Leggi kanska nøkur klæðir upp á pláss, alt eftir hvør stongdi kvøldið fyri. Eg skrivi niður, hvat manglar, ella leggi fram vøruna, ið er komin tann morgunin. Stóra borðið miðskeiðis í handlinum havi eg fingið til uppgávu at pynta við klæðum, skóm og prýði og blómum í einum flottum vasa. Borðið skal pyntast av nýggjum minst aðruhvørja viku, og pyntast serligt til høgtíðir. Og so er tað mannequin-dukkurnar í vindeygunum. Tær fylgja við klædnarákunum, og tær vísa okkara nýggjasta flotta.
Her er úr at gera.

Men hendan morgunin er einki.

Eg standi aftanfyri trædiskin og ruddi upp í pappírum. Tað er leiðarin ikki góð til. Men eg sleppi tí, sum eg geri, tá ið unga, brúnhærda kvinnan kemur inn. Eg standi og vóni, at hon fer at tosa við meg. Spyrja meg um hjálp. Men, sum sagt, sýnist hon ikki heilt at hugsa um verðina rundan um seg. Eg síggi á eygunum, at hon leitar eftir onkrum.

Hon heldur við báðum hondum fast um bandið á myrkagrønu taskuni, sum hongur um økslina og liggur framman fyri kroppin á henni. Akslarnar eru spentar. Hárið er í einum hestahala við nøkrum lokkum av leysum hári um andlitið, og hárið í hestahalanum er lívligt. Bleytar, men sjónligar, natúrligar bylgjur. Flottar. Eg eri øvundsjúk.

Eg suffi innantanna, tá hon gongur beint framvið diskinum og longur aftur í handilin. Ímóti kjólunum.
Hetta er ein lítil handil, ið vendir beint út til stóru gøtuna í miðbýnum, besta plássið í bygdini at hava handil. Tó er ikki nógv lív í uttan fyri vindeyguni.
Ein hurð mitt í og tvey rímiliga stór vindeygu á hvørjari síðu, har manequin-dukkurnar standa. Útstillingarborðið til vinstru og diskurin til høgru. Aftanfyri diskin er eitt lítið rúm, har trappur eru uppá til lagrið og pausurúmið. Hillar og stativ standa runt um allan handilin, og aftast eru prøvirúmini eitt sindur fjald.

Eg gangi út um diskin og fari at leita eftir kvinnuni. Eg gangi framvið buksunum og yvir til kvinnusektiónina. Eg finni hana við kjólastativið. "*Hvussu fái eg hjálpt tær?"* sigi eg so blítt sum møguligt. Eg havi lært á skeiði, at mann ikki skal spyrja, *um* mann kann hjálpa, men *hvussu.* Tá føla kundarnir seg meira vælkomnar.
Men kvinnan smílir ikki aftur. Hon sær eitt sindur nervøs út, og tekur fastari um bandið á taskuni. Hon hugsar eitt bil og sigur so lágmælt, "*Eg skal finna ein kjóla*." Eg leggi nú til merkis, at hon er væl styttri enn eg, hóast vit eru um sama aldur.
Tað er sum um, at hon vil siga okkurt meira, men torir, ella vil ikki. Vit báðar tiga eitt bil.
Eg risti kensluna av mær og spyrji enthusiastisk, "*Ja? hvat fyri kjóla? Fínan, gerandisligan? Langan, stuttan?".* Eg vóni, at eg ikki treingi ov nógv á. Tað er einki verri, enn tá arbeiðsfólk í handlum ikki geva tær frið. Eg haldi hendurnar saman og ivist í, um eg bara skal fara aftur til diskin og geva henni frið. Kvinnan hyggur rundan um seg, og gongur spakuliga runt. Følir ymisar kjólar. "*Okkurt flott. Men ikki for fínt*." sigur hon. Hon sær ein lættan, ljósabláan, langan kjóla, við hvítum, myrkabláum og lillalittum blómumynstri.
Hon vendir sær brádliga á. "*Eg skal til jarðarferð."*
Nú gevur alt brádliga meining. Eg broyti beinavegin andlitsbrá og gangi eitt fet nærri. "*Tað eri eg sera kedd av at hoyra. Vit skulu nokk finna okkurt gott*." Eg taki skjótt tveir sera passandi svartar, miðallangar kjólar fram at vísa henni, men hon sær ikki nøgd út. Hon stendur enn og heldur um taskuna og hyggur so aftur eftir tí ljósabláa kjólanum. "*Mær dámar handan*."

Eg veit ikki, hvussu eg skal svara. Hevur hon ikki verið til jarðarferð fyrr?
Eg lati munnin upp og ætli mær at siga okkurt, men veit enn ikki hvat, og eg steðgi á. Hon gongur yvir til kjólan, tekur eina stødd extra small av hillini og fer inn í prøvirúmið. Eg standi eftir við svørtu kjólunum.
Eg summi meg og leggi kjólarnar upp á pláss aftur. Eg kenni hana ikki. Kanska var tann deyði ein, sum elskaði litir og vildi ikki, at jarðarferðin skuldi vera syrgilig? Tað eru tað fleiri í dag, sum vilja. Hvussu kann ein jarðarferð ikki vera myrk og syrgilig?
Gardinurnar verða drignar frá, og eg vendi mær ímóti kvinnuni.
Hon stendur beint uttan fyri passirúmið við einum evarska lítlum smíli á varrunum. Hon sær avbera vøkur út. Taskan liggur á gólvinum saman við klæðunum, hon var í, og hon hevur latið hárið niður. Bylgjurnar síggja enn flottari út nú, tá tær liggja lætt niður á klønu akslarnar, og eg hugsi, at soleiðis burdi hon havt tað oftari.
Eg sigi einki, men hon tekur mítt andlitsbrá sum svar og sær nøgd út. Hon vendir sær á, so kjólin flákrar, og dregur tungu gardinurnar fyri.

Tá ið hon kemur til kassan, sær hon aftur smæðin út og hyggur ikki rættiliga at mær. Hárið er aftur í hestahala. Eg taki fyri og eri júst líka friðarlig sum hon. Eg havi vanliga so góðar gávur at tosa við fólk. Men tað er okkurt við hesari kvinnuni. Skal eg siga okkurt um kjólan? Tað er okkurt, sum ikki er sagt, sum líkasum hongur í luftini. Eftir at hon hevur goldið, stappar hon ljósareyða plastposan í grønu taskuna og skal til at venda sær á. Men steðgar so og hyggur at mær. Hyggur eitt bil, áðrenn hon sigur, "*stóra takk fyri hjálpina*," við einum álvarsomum men takksomum andlitsbrái. Eg smíli og nikki, og kvinnan vendir sær á og fer út. Og lítla klokkan yvir hurðini ringir.

Tá ið eg eina viku seinni hoyri kirkjuklokkurnar ringja, komi eg í tankar um kvinnuna. Eg standi og leggi klæðir saman, tá ið eg síggi svarta bilin koyra framvið, og eg leggi arbeiði frá mær og gangi spakuliga yvir til vindeygað fyri at vita, um eg síggi hana fylgja. Kanska skal eg fara og heilsa upp á hana? Nei, sjálvandi ikki, eg kann ikki forstýra hana nú.
Eg síggi hana tó ikki, og eg leggi merki til, at øll eru í svørtum ella myrkum klæðum, so hetta man ikki vera tann jarðarferðin, hon skuldi til.

Eg standi eina løtu og hyggi eftir gentuni, sum gongur fremst. Eg helt hetta vera kvinnuna, sum keypti frá mær í farnu viku, men eg síggi nú, at tað kann ikki vera hon. Hendan hevur frøknur, og hárið er væl longri. Somu flottu krúllurnar hevur hon tó.